Álit

í

løgtingsmáli nr. 92/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almennu talgildu postskipanina Mínboks (Føroya Rættur fær heimild at senda og kunnuggera talgilt umvegis Mínboks)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen, hevur lagt málið fram 24. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð 7. mai 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8. og 13. mai 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Sorinskrivaran og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen, saman við Talgildu Føroyar.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Føroya Rættur er í holt við at tillaga sítt virksemi til talgild viðurskifti, undir hesum eisini at knýta seg í Mínboks. Í tí sambandi er ætlanin, at Føroya Rættur skal kunna senda "digital forkyndelse" (talgilda kunnuggering) umvegis Mínboks.

Kunnuggering er ein serligur háttur, ið verður nýttur til at senda týdningarmikil boð til ein móttakara, sum er partur av einum rættarmáli. Hesin persónurin verður gjørdur kunnigur við t.d. eina stevning, innkalling, dóm ella onnur rættarlig boð.

Kunnuggering kann ikki samanberast við vanliga postútbering. Við kunnuggering er tað ikki nóg mikið, at brævið er komið fram til móttakaran. Tað skal vera komið móttakaranum til kunnleika (t.e. opnað ella viðgjørt), og sendarin skal hava eina váttan um, at móttakarin hevur sæð boðini.

Tann, sum ikki møtir upp í rættinum, kann fáa dóm grundaðan á, at viðkomandi ikki møtti. Tí er sera umráðandi, at fólk fáa boðini um at tey skulu møta. Eftir verandi mannagongdum verða innskrivað brøv send við postinum, men tað kann taka fleiri dagar áðrenn brøvini koma fram, serliga um móttakarin ikki er á adressuni, og brævið tí møguliga skal sendast fleiri ferðir. Onkuntíð hjálpir løgreglan við at fáa boðini út, tá annað ikki er møguligt. Kunnuggering umvegis telefon kombinerað við telduposti verður eisini nýtt, men allar hesar mannagongdir eru ikki nóg effektivar, og tær krevja eisini nógva tíð og eru harafturat kostnaðarmiklar. Tað kann eisini vera keðiligt fyri móttakaran, at politiið kemur á gátt.

Føroya Rættur hevur samskift við Talgildu Føroyar, um møguleikan at nýta teirra skipan til kunnuggeringar. Talgildu Føroyar sær tað ikki sum nakran tekniskan trupulleika, men tað krevur, at virkisøkið hjá Mínboks verður víðkað, og eisini má lógin tillagast.

Ætlanin er, at sendarin av kunnuggeringini skal við nýggju skipanini móttaka eina váttan um, at móttakarin hevur móttikið og opnað kunnugeringina. Tey sum ikki brúka Mínboks, fara framvegis at fáa boðini soleiðis sum tey verða send nú.

Nýggja skipanin verður bara galdandi fyri likamligar persónar og ikki fyri løgfrøðiligar persónar, tí tað eru bara likamligir persónar, sum hava Mínboks.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 15. mai 2026

Helgi Abrahamsen formaður	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur næstforkvinna	Bill Justinussen
Bjarni Hammer	Eyðgunn Samuelsen	Sirið Stenberg
	Ruth Vang	